# Gullveitsla á føðingardegnum



*Unglingaliðið hjá Kyndli, sum í sera spennandi dysti vissaði sær gullmerkið fríggjakvøldið*



*1. deildarliðið hjá Kyndli er ein sterk blanding av ungdómi og rutinu*

**Bæði í næstbestu deildini og í unglingadeildini hevur Kyndil vunnið gull**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tykist, sum er Kyndil veruliga flúgvandi á manssíðuni í ár. Besta manslíðið er sera væl ávegis at vissa sær sess í FM-finaluni, og um vikuskiftið vunnu bæði unglingar og næst bestu menninir eisini gull.

Ikki minst var talan um ein sera spennandi dyst, tá unglingarnir í oddabrakið móti Neistanum vissaðu sær gullið. Neistin kundi standa seg við javnleiki, og eitt drúgt skifti vóru teir fleiri mál á odda. Kyndil fekk tó bart seg framum, og bara hálvan minutt fyri leiklok vóru teir tvey mál frammanfyri. Tá eydnaðist tó teimum bláu at minka um munin, og í evstu løtu áttu teir aftur møguleika, sum tó ikki gav úrslit.

1. deild hjá Kyndli spældi í avgerandi dystinum móti StÍF, og tann dysturin endaði við tryggum sigri til kyndils-menn. Liðið hjá Kyndli er her ein blanding av spælarum, sum hava tænt fyri seg á besta liðnum, og so nøkrum yngru kreftum, sum stríðast fyri at vinna seg eitt fet longur upp.

# Knotur eru í teimum gomlu

**Veteranarnir hjá VÍF vunnu leygardagin 2. deild fyri aðru ferð á rað**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir taka stuttliga til, at talan í veruleikanum er um lopfjølina til Atlantic Airways-kappingina. Mongu royndirnar, sum liðið hevur borga í øllum førum fyri dyggari uppvenjing hjá yngru spælarum – og kanska eisini onkrum av teimum eldru. Eitt nú hava Johnny Joensen og Áki Olsen báðir fingið grundvenjingina á sterka veteran-liðnum, áðrenn teir í vetur eru slopnir í part á besta liðnum hjá VÍF. Og sagt verður eisini, at liðið í Jóan Paula Høgnesen er í ferð við at menna enn ein spælara, sum teir vænta fer at gera nógv um seg í framtíðini.

Um árið í ár má ananrs siga, at úrslitini hava verið framúr hjá liðnum. Annað árið á rað komu teir gjøgnum kappingina uttan yvir høvur at tapa dyst. Eisini hóast teir roknaðu við harðari mótstøðu frá arvafíggindunum úr Kyndli. Seinni dysturin millum tey bæði liðini varð tó av ongum í ár. Hetta tí Kyndil ikki møtti til seinna dystin í Vestmanna.

Seinasta dystin hetta kappingarárið spældu vestmenningarnir altso leygardagin. Tann dysturin var móti StÍF, og vann VÍF hendan dystin ikki minni enn 46-18.



*Vinnandi liðið hjá vestmenningum eftir seinasta dystin í ár. Aftast frá vinstru eru Rógvi Nielsen, Sjúrður Holm, Finn Jørgen Olsen, Oyvindur Brimnes, Einar Brimnes, Hjalmar Klein Olsen Heðin W. Olsen, liðleiðari, Petur Frank Joensen, Jóan Pauli Høgnesen, Bárður Nielsen, Marner Seloy og Pauli Zachariassen*

## Kyndil heldur føðingardag



**Í samband við at tað fríggjadagin 10. mars eru 50 ár síðan Kyndil varð stovnað, verður móttøka í Mullers pakkhúsi sama dag kl. 16 - 18.**

KYNDIL 50 ÁR
*Tíðindaskriv*

Á skránni til móttøkuna verður millum annað heiðran av trimum av undangongumonnum felagsins, sum hendan dagin verða útnevndir heiðurslimir.

Nýggj fløga við 10 løgum verður løgd fram, og høvi verður hjá áhugaðum at ogna sær hana á staðnum. Sangirnir og løgini eru tey flestu spildurnýggj og gjørd til høvið.

Øll handbóltsáhugað, kyndilsfólk sum onnur, eru hjartaliga vælkomin, og er onkur, sum á staðnum vil heilsa felagnum, so er hann eisini hjartaliga vælkomin til tað.

**Søga** felagsins verður skrivað í løtuni. Tað er útvarpsmaðurin Suni Merkisstein, sum hevur átikið sær uppgávuna. Útgávudagurin er settur at verða 18. mai.

Verður fyri yngru liðini fríggjakvøldið og leygardagin. Flestu feløg í landinum eru við, og heiðursmerki verða latin nr. 1, 2 og 3 í øllum deildum.

Skráin fyri kappingini er send feløgunum, men hon sæst eisini á heimasíðu felagsins: www.kyndil.fo

**Myndaframsýning** og tombola skuldi vera í SMS hetta vikuskiftið, men av tí at har verður bygt um, er framsýningin útsett til seinni.

Leygarkvøldið 11. mars verður veitslan í HB-húsinum.